# kki góðtikin





*Strammur fíggjarpolitikkur og burtur við revolvarapolitikkinum. Tað vóru tveir av høvuðsboðskapunum hjá Høgna Hoydal í formansfrágreiðing síni*

*Mynd: Leo Poulsen*

og broyta serskipanir og bygnaðir, sum í dag als ikki gagna teimum endamálum tey vóru ætlað til.

Eisini málsbýti, fíggjarstýring og fíggjarliga býtið millum land og kommunur fer at elva til ósemjur og orðaskifti.

Eins og spurningurin um fiskidagamarknað og tilfeingisumsiting.

Men vit noyðast at tora at viðgera málini og taka avgerðirnar um broytingarnar eftir eitt sakligt orðaskifti.«

Høgni Hoydal nýtti eisini høvið til at ávara egnar floksfelagar móti tí, sum hann nevndi revolvarapolitikkur.

»Skulu vit veruliga hepnast í at fáa hetta stjórnarsamstarvið at rigga, so krevst eisini, at tær afturvendandi hóttanirnar og revolvarapolitikkurin frá einstøkum samgongulimum um einstøk mál, halda uppat.

Sjálvsagt hava øll síni hjartamál at berjast fyri. Men ber ikki til at tosa sakliga saman um at gera ætlanir og loysa mál uttanum forsíður og innsløg í fjølmiðlunum, so máa vit alt álit undan stjórnarsamstarvinum.

Eg sigi beinleiðis: Hóttanir hava akkurát øvuta ávirkan á meg enn at fremja málini.

Og mítt svar til revolvarapolitikk er: Skal stuðul til samgonguna takast aftur og brúkast sum amboð. Tá alt ikki gongur beint eftir egnari vild, so er best at taka seg úr beinanvegin.«

## Broytingar

Formaðurin nam síðani við mongu broytingarnar, sum eru farnar fram í seinastuni.

»Hetta farna árið hevur verið eitt satt broytingarár – fyri Tjóðveldi og fyri politiska skipanina í Føroyum sum heild. Ikki bert tí vit eru í stjórn, hava gjørt nýggjar politiskar samansetingar, sett nýggj mál og sett nýggj fólk við.

Vit hava í farna árið endurnýggjað okkara samleika við nýggjum búmerki, styttum navni, ið leggur dent á hugsjónina, og við nýggjum orðaðum hjartamálum á øllum økjum. Vit hava lagt grundina til nýggjar og øðrvísi samskiftishættir í politikki og í fólkaræðisliga orðaskiftinum.

Og Føroyar eru skipaðar sum eitt valdømi, ið kann leggja nýggjan bygnað á mongum mótum. Broyta politiska arbeiðið djúptøkið. Broyta arbeiðið í flokkunum og lokalfeløgum. Broyta fólkaræðisligu luttøkuna og ávirkanina. Og broyta Føroyakortið.

Hetta hava eisini verið broytingar, ið ósemja hevur verið um í okkara flokki. Og tí er eisini sera ymiskt, um vit síggja hetta sum framar ella sum vandar og afturstig.

Men hetta eru bert broytingar á skræðuni enn. Eftir stendur tað veruliga arbeiðið at geva hesum nýggju slóðum og rásum, ið eru lagdar, ta kós, ta uppfylging og tað innihald, ið kunnu fremja okkara hugsjónir og mál í verki.

Vit hava vunnið sjey val á rað, tá vit rokna løgtingsog fólkatingsval saman. Men vit hava onkið vunnið, um vit ikki megna at gera valsigrar til frælsisúrslit.

Samgonguskjal og landsstýrissessir eru eisini bert broytingar á skræðuni – enn. Størsta vandamálið er, at vit halda, at nú er væl sloppið, og at vit hava rokkið nøkrum veruligum málum.«

Sjálvandi var eisini nomið við valskipanina.

»Nú Føroyar eru eitt valdømi krevst ein nýggjur og øðrvísi leiklutur hjá politisku økisfeløgunum.

Mítt ynski er, at økisfeløgini fáa ein aktivan leiklut í at mynda politikk floksins á øllum økjum, heldur enn at hava mest samband við síni umboð.

Nú vit eru í stjórn er serliga neyðugt, at økisfeløgini og aðalstjórn í nógv størri mun gerast partar í at viðgera eisini stór politisk mál, ið fara at skapa ósemjur og kjak. At økisfeløgini fáa størri ávirkan á førda politikkin gjøgnum kjakfundir og temafundir og tætt samband við valdu politikararnar.

Føroyar sum eitt valdømi krevur eisini eina broyting í kommunala bygnaðinum, har mál, su í dag liggja hjá løgtingi og landi kunnu leggjast til nýggjar størri kommunur at umsita.

Tað kundi verið fyrsta málið økisfeløgini tóku upp.

Til fólkaatkvøðuna um grundlógina í 2010 liggur eisini ein sera stór uppgáva hjá økisfeløgunum at fara undir at viðgera grundlógaruppskotið og taka virknan lut í viðgerðini upp undir fólkaatkvøðuna.«

## Politisk mótstøða

Høgni Hoydal kom eisini inn á politisku mótstøðuna, sum flokkurin kennir.

»Øll tey tøkini og tann framburður, sum vit í dag øll eru fegnast um og vilja verja við hond og fót, eru mál, ið elvdu til ósemju og sterka politiska mótstøðu í drúgv tíðarskeið.

Um tað er stríðið fyri føroyskum máli. Skúlaskapi. Føroyskum bókmentum. Flaggi. Sjómarki. Undirgrund. Flogfelag. Altjóða umboðan í ítrótti. Niðurskurð av blokkinum. Samráðingum við onnur lond og felagsskapir. Tjóðpalli. At taka ábyrgd av okkara egna samhaldsfesti og geva veikastu samfelags-bólkunum sømdir í Føroyum. Umboðan og egnum samleika uttanlands.

Í øllum hesum málum hava verið fólk og rørslur uttanfyri politisku skipanina, ið hava borið stríðini ígjøgnum. Hóast mótstøðuna.

Ta somu mótstøðuna, sum vit nú fáa trúttað upp í saman, tá tað snýr seg um at skipa eitt føroyskt fíggjareftirlit á altjóða støði. Og tann sama mótstøðna, sum fer at verða endurtikin í sambandi við føroyska stjórnarskipan, blokkstuðulsniðurskurð og at taka onnur mál á føroyskar hendur.

Politiska skipanin er støðugt yvirhálað av menningini aðrastaðni í samfelagnum, og at enda er politiska skipanin drigin við.

Hetta hava eldsálirnar í mentanarlívinum prógvað ferð eftir ferð.

Hetta hava føroysk vinnulívsfólk prógvað, tá tey hava leitað út í heim eftir nýggjum miðum og drigið virðir heimaftur.«

Og hann helt fram:

»Føroyska vinnulívið krevur altjóða lógarverk, tiltøk at verja umhvørvi, útbúgving og gransking, betri handils-, flutnings- og samskiftismøguleikar. Og bjóðar heimsins leiðarum til okkara.

Føroyski ungdómurin krevur broytingar. Tey vilja virka og mennast í einum samfelag, har tú ikki noyðist at broyta samleika til tess at sleppa út í heim ella at koma aftur.

Og øll tey mongu, sum í almennum ella privatum starvi skulu samskifta við skipanir, fyritøkur og felagsskapir í øðrum londum, ásanna dagliga, at vit mugu kunna samskifta og gera avtalur sum vaksin og javnsett fólk.

Eftir stendur at politiska skipanin megnar at loysa hesar avbjóðingar.«

## Heimsins nalvi og miðstøð

Høgni Hoydal endaði sína formansfrágreiðing við hesum orðum:

»"Vit búgva ikki í Føroyum av praktiskum orsøkum", segði Heðin Brú. Og tað er so satt, sum tað er sagt.

Uttan ta mentan, tað mál og tey virðir, ið hava skapt okkum sum menniskju og sum fólk gjøgnum túsund ára søgu, so vóru Føroyar bert grót og flag í Atlantshavi, sum londini kring okkum høvdu barst um at havt sum umveldi ella territorium fyri valdsins sakir.

Allar sonevndar cost-benefit metingar og allar sonevndar rasjonellar útrokningar í rokniørkum vilja siga, at tað hevði verið so nógv lættari og ódýrari bert at búð á meginlandinum og tosa okkurt annað mál. Sum eisini onkur embætisnevnd á sinni skeyt upp at gera. Har bæði marknaður, fólkameingið, flutningur og samskifti er høgligari og einfaldari.

Og tá William Heinesen segði, at Tórshavn er heimsins nalvi, so kunnu vit leggja afturat, at eitthvørt pláss er heimsins nalvi – fyri tey, sum hava kastað sítt hjarta og sítt akker har.

Men vit mugu velja at síggja okkum sum heimsins nalva og miðstøð. Ikki sum endastøð.

Vit skulu tí sjálvandi støðugt byggja út infrakervið, samskiftis- og virkismøguleikarnar heima hjá okkum og skapa einar størri og javnari Føroyar.

Men vit skulu nú eisini byggja upp tað "infrakervið" sum krevst til at føroyingar sum heild kunnu berja seg burturúr mentalu, politisku og vinnuligu støðuni sum útjaðari. Vit skulu byggja út tað infrakervið, sum kann menna Føroyar til eina miðstøð, haðani vit kunni virka í beinleiðis altjóða, dynamiskum samstarvi á øllum mótum.«